# Einføld summarkapping við stórum vinningum



Aftur í summar bjóðar Sosialurin til eina spennandi kapping, hesaferð í samstarvi við Rás2. Kappingin byrjaði 9. mai og varir henda mánaðin út, har flogferðir við uppihaldi verða burturlutaðar tríggjar ferðir um vikuna.

Nú leggja báðir miðlarnir til brots aftur, í samstarvi við Atlantsflog, við eini einfaldari, men kortini sera spennandi kapping.

Fyri at vinna hesar góðu vinningarnar, skalt tú í roynd og veru bert svara rætt uppá fimm spurningar. So ert tú við.

Mannagongdin er henda: Hvønn dag, tá Sosialurin kemur út, fer Rás2 - millum klokkan 9 og 12 - at seta fokus á summarkappingina og tað ávísa ferðamálið á rutunetinum hjá Atlantsflogi. Talan er um mánadag, mikudag og fríggjadag.

Eftir tíðindini kl. 11 verður eitt lítið prát, og frá klokkan 11:30 er tað at fólk kunnu ringja inn og svara rætt uppá teir fimm spurningarnar eftir 60 sekundum. Klárar lurtarin tað, hevur hann vunnið ein ferðaseðil við uppihaldi fyri tveir persónar eitt ávíst tíðarskeið.

Svarini uppá hesar fimm spurningarnar eru at finna í Sosialinum frammanundan. Tí kann ein lættliga svara spurningunum, meðan ein situr við blaðnum frammanfyri sær.

Vælkomin at vera við. Og góða ferð fyri tann hepna!

## 9 sekund frá vinninginum

Mikudagin vóru tvær flogferðir til Íslands við uppihaldi at vinna hjá lurtarunum á Rás2.
Telefonirnar gløddu henda hálva tíman millum klokkan 11:30 og 11:55, men tað eydnaðist ongum at svara rætt uppá teir fimm spurningarnar eftir 60 sekundum.
Ein lurtari var bert 9 sekund frá at vinna, men kundi ikki svara seinasta spurninginum nóg skjótt.
Soleiðis slapp eingin lurtari til Reykjavíkar og Hotel Ørkina á hesum sinni.
Fríggjadagin verður aftur høvið til hetta sama, - hesaferð ein ferð til Keypmannahavnar.

